## Beinta av Reyni í Listasavni



Í summar skipar Listasavn Føroya fyri framsýning við Beintu av Reyni, har 26 málningar vera at síggja. Hon málar modernað og nýrealistisk, og setir áskoðaran í bás í landslagsmálningum sínum við at mála gardinur og blómur frammanfyri, so at áskoðarin verður tilvitaður um, at hann hyggur innanífrá og út gjøgnum vindeygað. Hetta er tað sokallaða kvinnuliga sjónarhornið, tí arbeiðsplássið hjá kvinnuni var har heima, og soleiðis upplivdi Beinta av Reyni føroyska landslagið sum barn hjá ommuni og abbanum á Eiði. Í samband við framsýningina er bók gjørd, ið Dagmar Warming listfrøðingur hevur skrivað.

## Fríhandil í Húsavík

Omanfyri 40 vesturnorðurlendskir og danskir tinglimir, ráðharrar og serfrøðingar, umframt eygleiðarar frá russisku Duma hittast í Húsavík í Íslandi í døgunum 14.-17. juni, fyri at kjakast um fríhandilsavtalur, og grundarlagið og møguleikarnar fyri einum tættari samstarvi viðvíkjandi fríhandli. Íslendski og grønlendski uttanríkismálaráðharrarnir, Ingibjörg Sólrún Gísladóttir og Aleqa Hammond, luttaka saman við Magna Laksáfoss, landsstýrismanni í fíggjarmálum. Hetta er árliga temaráðstevnan hjá Útnorðurráðnum, sum hesaferð snýr seg um "Útnorður í einum altjóða heimi".



ICES mælir til, at eingin beinleiðis toskaveiða verður á føroyska landgrunninum komandi fiskiár. Tað verður løgtingið, sum seinni í summar kemur at taka støðu til hendan álvarsama spurningin

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Eftirspæl eftir dapra spádómin um toskin

**Spurningurin er, um nakað kann gerast, so toskaveiðan undir Føroyum gerst meira støðug, soleiðis at sveiggini í veiðini ikki gerast so stór. Royndirnar siga okkum, at ikki er lætt at stýra tilfeinginum og veiðini, soleiðis sum vit helst vilja hava tað at vera**

EFTIRSPÆL
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var á tíðindafundi í gjár, at Hjalti í Jákupsstovu, leiðari á Fiskirannsóknarstovuni og Jákup Reinert, fiskifrøðingur og limur í ráðgevandi nevndini hjá ICES, kunngjørdu fyribils tilmælið hjá felagsskapinum.

Í stuttum mælir ICES til, at eingin beinleiðis toskaveiða verður á føroyska landgrunninum í komandi fiskiári.

Formaðurin í vinnunevnd løgtingsins, Hendrik Old, er samdur við fiskifrøðingum um, at støðan hjá toskastovninum í løtuni er døpur, og somu áskoðan hevur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, eisini.

Formaðurin í Føroya Reiðarafelag, Jákup Sólstein, sigur seg ivast í ráðgevingini, tí royndir hava víst, at hendan onnur ár ikki hevur verið serliga eftirfarandi. Í øllum førum er toskurin komin aftur – og í nítiárunum kom stovnurin nógv skjótari fyri seg aftur, enn nakar tordi at droyma um.

Somu áskoðan hevur formaðurin í Meginfelag Útróðrarmanna, Auðunn Konráðsson, sum heldur, at myndugleikarnir ikki skulu taka døpru útlitini so tungt, men heldur lata fiskidagaskipanina standa sína roynd.

Jóhannes Olsen, formaður í felagnum hjá Línubátum, sigur, at verður bann sett fyri beinleiðis veiði eftir toski, er einki annað at gera hjá hansara limum enn at leggja línuflotan.

Hvørki línuflotin ella útróðrarflotin kunnu klára seg uttan toskin – og í aðrar mátar ber heldur ikki til at veiða við línu uttan so, at tú eisini veiðir tosk.

Í gjár vórðu eisini tøl nevnd, hvat tað kemur at merkja fyri føroyska fiskavirkisvinnu, um eingin beinleiðis toskaveiða verður loyvd í komandi fiskiári.

Hugsandi er, at ein av framleiðslunum hjá føroyskum virkjum, sum rættiliga hevði kent sviðan av slíkum veiðibanni, er saltfiskaframleiðslan, har dýrasta vøran verður virkað úr toski.

Eitt miðal ár liggur toskaveiðan undir Føroyum um eini 20.000-25.000 tons, og okkurt árið hevur veiðan verið omanfyri tey 40.000 tonsini.

Í kreppuárunum fyrst í nítiárunum var samlaða toskaveiðan niðri á nøkrum fáum túsund tonsum, men viðurskiftini broyttust, og eftir heilt fáum árum fór veiðan langt upp um eitt miðal ár.

Spurningurin er, um nakað kann gerast, so toskaveiðan undir Føroyum gerst meira støðug, soleiðis at sveiggini í veiðini ikki gerast so stór.

Tað er eingin, sum veiðir við línu og húki annars, ið ikki vil hava tosk. Hann rúgvar væl upp og hevur góðan og støðugan prís.

Hinvegin er spurningurin, um bæði skip, bátar og fiskaframleiðarar í longdini ikki høvdu havt tað betri, um veiðan var meira støðug. Á henda hátt høvdu fiskimenn og framleiðarar eins og keyparar í útlandinum havt eitt støðugari grundarlag, sum kanska í longdini hevði tænt samlaðu vinnuni best.

Royndirnar siga okkum, at ikki er lætt at stýra tilfeinginum og veiðini, soleiðis sum vit helst vilja hava tað at vera.

# Mælir til

**- Vit hava stongdar leiðir, og vit hava fiskidagar. Tað er avmarkað, hvørji ítøkilig tiltøk myndugleikarnir kunnu seta í verk til tess at verja tann smáa toskin. Men eitt, sum heilt vist hevði gjørt góðan mun beinanvegin, var at friða innastu leiðirnar fyri allari veiði í eina tíð. Hesar leiðir eru uppvakstrarøkið hjá fiskinum, sum skal seta til fiskiskapin, sigur Jákup Reinert, fiskifrøðingur**



FISKASTOVNAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Jákup Reinert, fiskifrøðingur og limur í ráðgevandi nevndini hjá ICES, heldur ikki, at eftirspælið um tilmælið hjá stovninum um onga beinleiðis toskaveiði komandi fiskiár hevur verið ógvusligari enn væntað.

- Nei, eg haldi ikki, at eg havi hoyrt nakað, eg ikki væntaði at hoyra.

Fiskifrøðingurin heldur, at bæði Hendrik Old, formaður í vinnunevnd løgtingsins og landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, sum var við á tíðindafundinum í gjár, taka støðuna við toskastovninum í álvara.

- Hinvegin er eisini náttúrligt, at vinnan kemur við sínum útspæli, tá ráðgevingin í fyrstu syfti gongur teimum ímóti.

Hann heldur, at tendensurin í fleiri ár hevur verið, at ráðgevingin skal tigast burtur og ikki takast fyri nakað serligt – og síðan skulu tingini bara laga seg, soleiðis sum tey nú einaferð gera.

- Jú, eg haldi, at Bjørn Kalsø veit, at støðan við toskinum í løtuni er hættislig, og tað veit Hendrik Old eisini. Spurningurin er so bara, hvat teir fara at gera, og hvat teir kunnu gera.

Jákup Reinert er tó sannførdur um, at støðan kann gerast uppaftur daprari við toskinum, um eingi stig verða tikin til vernd av ungfiskinum.

Spurdur, hvat hann væntar, at landsstýrið fer at mæla løgtinginum til at gera, sigur fiskifrøðingurin, at hugsandi er, at Føroyabanki verður stongdur fyri veiði – antin totalt ella partvís.

- Vit hava stongdar leiðir, og vit hava fiskidagar. Tað er avmarkað, hvørji ítøkilig tiltøk myndugleikarnir kunnu seta í verk til tess at verja tann smáa toskin.

Og tó.

- Eitt, sum heilt vist hevði gjørt góðan mun, er, um útróðrarflotin ikki slap at